## Milan leigar Beckham

Alt bendir á, at David Beckham komandi mánaðirnar fer at spæla fyri italska AC Milan. Amerikanska LA Galaxym, har Beckham spælir, er nú farin í vetrarsteðg, og fyri dystarvenjingina í Beckham er hetta sjálvandi ikki optimalt. Ivamál er tó um, hvussu langan leigusáttmála talan verður um. Galaxy vil ikki, at sáttmálin verður longur enn tríggjar mánaðir, meðan italska stórfelagið helst vil hava ein sáttmála, sum gongur yvir í minsta lagi seks mánaðir.



## McCain setir OL í vanda

Verður John McCain nýggjur amerikanskaur forseti, merkir hetta samstundis, at Chicago kann gloyma alt um at gerast OL-vertur í 2016. Tað er í øllum førum áskoðanin hjá enska BBC, sum grundar hetta við leiklutinum, sum McCain hevði, tá mutur-gøla tók seg eftir vetrar OL í Salt Lake City fyri seks árum síðani. Ta ferðina stóð McCain senatorur á odda fyri eini hoyring, har millum annað OL-forsetin, Juan Antonio Samaranch, varð innkallaður. BBC metir, at Samaranch tí undir ongum umstøðum fer at síggja positivt upp amerikanskt vertskap fyri OL, um McCain er amerikanskur forseti.

# Málveitsla kring Europa



*Liverpool var bara sjey minuttir frá sigrinum í Madrid, og vónbrotið var stórt hjá Mascherano og liðfeløgunum, tá Simao javnaði*

*Mynd: Polfoto/AP*

**53 mál komu í teimum 16 dystunum, sum vórðu spældir í Champions League hetta umfarið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Týskvøldið einsamalt gjørdist tað málríkasta í søguni hjá Champions League. Tá fullu 36 mál í teimum átta dystunum, og tó at mikukvøldið ikki varð fult so hendingaríkt, so var samlaði totalurin nóg mikið til væl og virðiliga at fylla goal-show'ið, sum Viasat sendi mikukvøldið.

Nú bólkaspælið er komið í helvt, eru fleiri lið, ið longu mest sum hava vissað sær víðari atgongd í kappingini. Í øllum førum skal nógv ganga galið, um Barcelona, Manchester United, Villarreal, Bayern München, Juventus og Real Madrid ikki spæla seg víðari í kappingini.

Ikki minst er merkisvert, at spenningurin í bólki H ikki er størri enn tað sama. Her varð roknað við, at Zenit Petersborg veruliga skuldi hótta stóru Juventus og Real Madrid, men við einum stigi fyri tríggjar dystir hava UEFA-Cup meistararnir mest sum útspælt sín leiklut longu nú. Og ikki minst var talan um stórt vónbrot, tá teir bert spældu javnt móti hvítarussiska Borisov.

### Javnt í Madrid

Stóri dysturin í gjárkvøldið stóð millum Atletico Madrid og Liverpool, og tann dysturin endaði við einum máli til hvønn partin.

Liverpool kom annars á odda tíðliga í dystinum við máli frá Keane, men Simao javnaði, tá sjey minuttir vóru eftir at spæla. Atletico hevði eisini bóltin í netinum eina aðru ferð, men ta ferðina helst linjudómarin onkursvegna, at Maniche var rangstaddur.

Og so gjørdist mikukvøldi eisini kvøldið, tá lítla Anorthosis Famagusta fyri fyrstu ferð tapti í Champions League, men 0-1 í Milano móti Inter er væl og virðiliga til at liva við hjá oyggjabúgvunum, sum enn eru á einum mest sum sensationellum øðrum plássi í sínum bólki.

**Úrslitini**

| | |
|---|---|
| **Bólkur A** | |
| Bordeaux-CFR Cluj | 1-0 |
| Chelsea-Roma | 1-0 |
| **Bólkur B** | |
| Inter-Anorthosis | 1-0 |
| Panathinaikos-Werder Bremen | 2-2 |
| **Bólkur C** | |
| Shakhtar D.-Sporting L. | 0-1 |
| Basel-Barcelona | 0-5 |
| **Bólkur D** | |
| Atletico Madrid-Liverpool | 1-1 |
| PSV Eindhoven-Marseille | 2-0 |
| **Bólkur E** | |
| Villarreal-AaB | 6-3 |
| Manchester Utd—Celtic | 3-0 |
| **Bólkur F** | |
| Bayern München-Fiorentina | 3-0 |
| Steaua Bukarest-Lyon | 3-5 |
| **Bólkur G** | |
| Fenerbache-Arsenal | 2-5 |
| Porto-Dynamo Kiev | 0-1 |
| **Bólkur H** | |
| Juventus-Real Madrid | 2-1 |
| Zenit Petersborg-Bate Borisov | 1-1 |

## Lassin á Camp Nou

**Lassin Isaksen, sum áður hevur virkað sum altjóða dómari, skal um tvær vikur á stóra uppgávu sum dómaraeygleiðari**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá FSF verður sagt, at Lassin skal á sjálvasta Camp Nou í Barcelona, har hann skal halda eyguni eftir dómaraavrikinum í dystinum millum Barcelona og Basel í Champions League.

- Eg gjørdist rættiliga paff. Eg hevði roknað við at verið sendur til onkran dyst í grannalagnum, og hevði ikki roknað við einum so stórum dysti. Men rætt skal vera rætt. Eg skal ikki vera einsamallur eygleiðari til tann stóra Champions Leauge dystin, sigur Lassin við heimasíðuna hjá FSF

- Tað er soleiðis, at teir ungu eygleiðararnir skulu fylgja einum royndum eygleiðara í fyrstuni, sum virkar sum eitt slag av mentor. Eg skal vera saman við einum týskara til dystin á Camp Nou. Eg skal eftir dystin skriva mína egnu frágreiðing, og lata týskaranum. Hvat hann síðan ger við mína eygleiðing, veit eg satt at siga ikki.

Lassin er fegin um, at tað nú eydnast honum at koma við í evropeiska samstarvið viðvíkjandi dómaraeygleiðing.

- Vit hava ein altjóða eygleiðara frammundan - Niklas á Líðarenda - og meðan eg fegnist um, at eg eisini havi fingið henda møguleikan, gleðist eg eisini vegna føroyskan fótbólt. Tað má vera ein fyrimunur fyri føroyskan fótbólt, at FSF nú er umboðað av tveimum altjóða dómaraeygleiðarum, sigur Lassin Isaksen áa www.football.fo.